# Grønlandsvegur 5

## Tórshavn

## Prísuppskot kr. 9.000.000




| Stødd | Grundøki | Kømur | Hæddir | Árgangur |
|---|---|---|---|---|
| 665 m2 | 516 m2 | Sí tekningar | 2 (4) | 1950´unum |

- Sentral staðseting
- Góðir útleigumøguleikar
- Nýggj hitapumpa

## Skrivstovuogn við góðum møguleikum. Møguleiki at leiga út til fleiri leigarar.

SKIFT
SKRÁSETTUR OGNARMEKLARI


*Ábyrgd:*
**Dánjal Jákup Wiberg Holm**
Sølu- og metingarmaður
Tel: +298 750 951
T-post: dj@Skift.fo


Sett til sølu: 27.03.2026
Rev. Dagf.



# Bústaðarlýsing




www.kortal.fo - kortið er vegleiðandi

## Eigaraviðurskifti

Bústaður: Grønlandsvegur 5 — Matr. nr.: 903g Tórshavn
Eigari síðan: 22.12.2015
Serlig viðmerking:

Ognin kann yvirtakast: Eftir nærri avtalu við seljara. Leigumálini hava 6mðr. uppsøgn.

## Húsaskoðan

Fyriliggur støðulýsing: Ja [x] Nei [ ]

Bjóðar seljari ognarskiftistrygging, galdandi í 5 ár. Ja [ ] Nei [x]

## Eigarafelag

Er ognin partur av eigarafelag: Ja [ ] Nei [x]

Fyriliggja felags viðtøkur: Ja [ ] Nei [x]

## Fakta um ogn

| | | | |
|---|---|---|---|
| Slag | Skrivstovubygningur | Ásetingar/Byggisamt. | A1 í 3. grundumráði |
| Byggiár | 1950´unum | Teknað / snið | Ikki upplýst |
| Bygt øki | (291+29+54) = 374 m2 - sí støðufr. | Rottangi | Smb. Kortal.fo: suður/eystur horninum |
| Bruttovídd | ((291*2)+29+54) = 665 m2 - sí støðufr. | El mátari | Rúm 211 |
| Grundøki | 516 m2 | Stoppkrani | Rúm 204 |
| Hæddir | 2 (4) | Væðing | Nei |
| Skrivstovur | Sí tekningar | Ovastaloft | Ja |
| Fríhædd | | P-Pláss | Ja |

# Bústaðarlýsing

**Innrætting:**

| | |
|---|---|
| Ovasta hædd<br>m2 | Sí tekning. |
| Ovara hædd<br>m2 | Sí tekning. |
| Miðhædd<br>m2 | Sí tekning. |
| Niðara hædd<br>m2 | Sí tekning. |
| Niðasta hædd<br>m2 | |
| Annað<br>m2 | Bilhús, sí tekning |

**Byggiháttur:**

Sbrt. eigara eru partar av bygninginum stoyptir upp og partur bygdur við timbri. Timbur klædningur. Træ/alu vindeygu. Ymisk sløg av tekjum. Fyrivarni má takast. Eigari kennir ikki hvønn smálut.

**Bygt:**

| | |
|---|---|
| Stoypiarbeiði | |
| Timburarbeiði | |
| El - arbeiði | |
| HVS - arbeiði | |
| Málaraarbeiði | |
| Annað | |
| Sjálvi bygt | |

**Viðlíkahald**

| | |
|---|---|
| Framdar umvælingar | 2016: Vindeygu og klædningur skift. 2025: Luft til vatn hitapumpa sett upp. Annars dagført leypandi. |
| Møguligar umvælingar | Sí støðufrágreiðing. |

**Rakstrarútreiðslur:**

| Lýsing - heiti | Litrar / Kwt (árliga) | Kr/mðn | Kr/ár |
|---|---|---|---|
| Orka - miðal í 3 ár | | 2.291,67 | 27.500,00 |
| Orka - fyri árið í fjør | | 0,00 | 0,00 |
| Eigarafelag | | 0,00 | 0,00 |
| Útreiðslur tilsamans | | 2.291,67 | 27.500,00 |

# Bústaðarlýsing

**Nágreining**

| | Viðmerkingar | Aldur |
|---|---|---|
| Sokkul / grund | Betong | 50'ini |
| Útveggur | Útveggir eru helst betong og timbur. | |
| Klædningur | Timbur klædningur | 2016 |
| Vindeygu | Træ/alu vindeygu | 2016 |
| Tak | Aluminium og stál. Kenna ikki árgang. | |
| Tróður | Nei | |
| Bjálving | Bleiv bjálvað uttan í samband við klæðingina. Sproytibjálva innan, útveggur. | |
| Dekk millum hæddir | Timburdekk millum hæddirnar | |
| Hitakelda | Luft til vatn frá 2025 | 2025 |
| Oljutangi | Oljutangin er ikki í brúk. Kenna ikki aldur og stand. | |
| Rør - hitaskipan | Eldri leiðingar | |
| Luftskipan | Nei | |
| Køkur | Felags køkur | |

| | |
|---|---|
| Við í søluni | |
| Ikki við í søluni | |

**Aðrar upplýsingar og viðmerkingar**

1. Ein leki var staðfestur í tekjuni. Smb. handverkara lak um seymirnar í ryggás, Seymirnir eru skiftir av seljara/ handverkara, og rokna verður við at nú er tætt.
2. Spor eftir lekum sæst í lofti við vesir í niðastu hædd. Talan er um gamlir lekar, tí tekjan yvir tí partinum bleiv skift fyri uml. 2 árum síðani.
3. Rakstrarútreiðslurnar eru mettar
4. Ognin er út -og samanbygd upp gjøgnum árini.
5. Støddir og standur, sí støðufrágreiðing
6.

Upplýsingarnar eru givnar eftir eigarans bestu sannføring. Tað kann tó ikki væntast, at eigarin í øllum førum hevur nøktandi kunnleika til standin og støðuna, tí eigarin hevur ikki fakligt innlit í byggifrøði og/ella veit ikki nóg mikið um ognina, tí hann/hon hevur yvirtikið ognina frá øðrum fyri stuttari ella langari tíð síðani. Fyrilit má takast fyri hesum. Sp/f Skift kann ikki ábyrgdast fyri upplýsingar frá seljara.

Skift mælir keyparum til at gjøgnumganga ognina væl og virðiliga við fakfolki, ið hava byggifrøðiligt innlit. Eins og at søkja sær alla neyðuga ráðgeving í samband við keyp av fastogn.




# Støðufrágreiðing

*Av ognini Grønlandsvegur 5 - matrikkul nr 903g, Tórshavn*

*Frágreiðing dagfest 16.03.2026*

SKJAL Elias Hansen Byggifrøðingur * Tlf. 229515 * elias@eskjal.fo

**Frágreiðing**

Undirritaði hevur fingið áheitan frá eigarunum um at gera eina støðufrágreiðing, av omanfyri standandi bygningi.

Undirritaði var á staðnum tann 12. mars 2026, og gjørdi eina gjøgnumgongd av bygningunum. Gjøgnumgongdin varð einans gjørd visuelt. Einki varð tikið frá ella tikið niður fyri at kanna aftanfyri liggjandi bygningslutir.

Tær teknisku installatiónirnar eru bert partvís gjøgnumgingnar, meðan EL innstallatión ikki er partur av hesi støðufrágreiðing.

**Generelt um bygningarnar:**

At síggja til er bygningurin bygdur út í nøkrum umførum og síðani dagførdur leypandi.

Vegleiðandi stødd á bygningi, útvendig mát:

- Bygningur, sum er tvær hæddir, er 291 m2 hvør hæddin
- Útbygningur har vesini eru er 29m2
- Útbygningur har garasja og teknikrúm eru er 54m2

Sambært kortal.fo er matrikkul nr. 903g tynglýst til at vera til støddar 516m2.

Eftir gjøgnumgongdina eru hesir feilir og manglar skrásettir:

**Uttandura:**

- Timburklædningur manglar málaraviðgerð. Á vegginum norðureftir er "gróður" lagstur á timburklædningin. Orsøkin kann vera trøðini, sum standa á stykkinum við síðuna av
- Tað er at síggja til manglandi glopp millum undirkant á timburklædningi og sokkulplátum til at skapa trekk/ventilering aftanfyri timburklædning. Við yvirkant á timburklædningi sær heldur ikki út til, at skipað útlufting er gjørd
- Sokkulplátur eru í fleiri støðum myrkar á liti, og sær hetta út til at koma frá, at timburklædningur liggur tætt inn móti sokkulplátuni? Í einkultum støðum er sokkulpláta smávegis brotin
- Nýggjar sinustakplátur eru lagdar á tann lægra uppíbygningin (har vesini eru). Har er manglandi hall á tekjuni

  Nýggjar ventilatiónshettur eru settar niður á tekjuna og má kannast eftir, um hetta er nóg væl gjørt í mun til tættleika og haldføri
- Tekjan á garasjuni og teknikrúmi hevur sum heild ivasamar tekninkar loysnir, og er sum heild í ivasomum standi. Rustur er í ,og er tað á norðara enda á teknikrúmi rustað hol í takskegg. Takrennan treingir til at verða reinsað
- Við skorsteinin á tí hægru tekjuni sær út til, at rustur er í tekjuni ella inndekningi? Tað er trupult at sleppa upp har, og má hetta tí kannast nærri

  Frá skorsteininum og norðureftir eru renningar at síggja á sternbrettinum?
- Fleiri av teimum síðuhongdu vindeygunum taka í millum karm og rammu, tá tey verða latin aftur. Pakningar eru í fleiri støðum leysir. Vindeygu ganga trekt - mangla smyrjing
- Á útveggum á garasjuni veksur planta/runnur upp eftir vegginum. Greinar fara upp undir inndekningin. Tað er ikki gott fyri betongveggin at planta veksur upp eftir honum
- Í einkultum støðum eru rennustokkar, har takvatnið ikki verður leitt burtur frá bygninginum
- Rúturin á úthurðini inn í teknikrúmið er brotin

**Innandura:**

- Inni í teknikrúminum eru spor eftir leka í loftinum
- Inni í gongini, har vesini eru, eru spor eftir leka. Hetta er helst frá áðrenn tekjan bleiv skift
- Inni í garasjuni, á tí sunnara útvegginum, er myrkur plettur á vegginum. Innhurðin inn í garasjuna er at síggja til ikki brunaverjuhurð
- Inn frá gongini í sunnara enda á tí vestara bygninginum er eitt vesi við brúsu. Har eru flísar á gólvinum, sum í støðum eru leysir frá undirlagnum
- Í sunnara enda á tí vestara bygninginum er ein trappa. Har er manglandi fríhædd og er væntandi forhold í mun til grund og stigning
- Í einkultum støðum eru saltúttreingingar at síggja á betongveggum

**Samanumtøka:**

Vísandi til omanfyri standandi eru umvælingar, sum skulu gerðast. Nøkur ting mugu kannast nærri, áðrenn støða kann takast, til hvat skal gerðast.

Annars verður mett, at bygningurin sum heild er í góðum standi.

Víst verður til myndir her niðanfyri.



Elias Hansen, Byggifrøðingur




Figure 1: útveggur eystureftir - út móti Grønlandsvegnum




Figure 2: útveggur norðureftir




Figure 3: endaveggir suðureftir



Figure 4: mynd tikin inn millum bygningarnar



Figure 5: timburklædningur manglar málaraviðgerð



Figure 6: manglandi glopp millum timburklædning og sokkulplátu. Sokkulpláta dálkast av timburklædningi



Figure 7: í einkultum støðum eru kantar á sokkulplátum brotnaðir



Figure 8: nýggj tekja er løgd á útbygning, har er manglandi takhall



Figure 9: ventilatiónshettur eru settar niður á tekjuna, at síggja til ein ivasom loysn?



Figure 10: tekjan er rusta hol, fótblikk manglar



Figure 11: takrenna treingir til at verða reinsað



Figure 12: at síggja til er rustur í tekju/inndekning við skorsteinin? Myrkar renningar eru niður eftir sternbrettinum?



Figure 13: pakningar á síðuhongdu vindeygum eru í støðum leysir



Figure 14: greinar vaksa upp millum betongvegg og inndekning



**Figure 15: einkultir rennustokkar eru ikki leiddir burtur frá bygninginum**



**Figure 16: rútur í úthurðini er brotin**



Figure 17: spor eftir leka í teknikrúmi



Figure 18: spor eftir leka í gongini uttanfyri vesini



Figure 19: myrkur plettur á útveggi í garasjuni



Figure 20: flísar eru í støðum leysir frá undirlagnum



Figure 21: fríhædd manglar



Figure 22: saltúttreingingar at síggja aftanfyri tapetið